gult28 cyan28 magenta28 svart28



# Hósdagur 19. apríl

## SVF

| | |
|---|---|
| 18.30 | Pinkupól 6 |
| 18.35 | Jumanji 11 |
| 19.00 | Tummilstummas |
| 19.10 | Salka Valka kring knøttin 6:6 (e) |
| 20.00 | Dagur og Vika við Grannum Okkara |
| 20.50 | Ferðaliðið – donsk dramarøð |
| 21.50 | Seinasti steðgur áðrenn mánan – donsk dokumentar |
| 22.20 | Krimitímin: Dalziel og Pascoe 1:2 – ensk røð |
| 23.10 | Menninir, sum hildu seg vera gudar – fronsk dok. |
| 00.00 | Liðugt |

## Eurosport

| | |
|---|---|
| 07:30 | Cycling |
| 08:30 | Golf |
| 09:30 | Marathon |
| 11:00 | Car Racing |
| 11:30 | Super Racing Weekend(Tm) |
| 12:00 | Rally |
| 13:00 | Golf |
| 14:00 | Boxing |
| 16:00 | Xtreme Sports |
| 16:30 | Xtreme Sports |
| 17:00 | News |
| 17:15 | Tennis (Live) |
| 18:30 | Jet Skiing |
| 20:00 | Boxing |
| 22:00 | News |
| 22:15 | Football |
| 23:15 | Tennis |
| 00:15 | News |
| 00:30 | Close |

## BBC Prime

| | |
|---|---|
| 00.00 | Tlz Promised Land |
| 01.00 | Tlz White Heat |
| 02.00 | Tlz Ou Sounds |
| 02.10 | Tlz Ou Talks |
| 02.25 | Tlz Ou Bites |
| 02.30 | Tlz Ou S330 |
| 03.30 | Tlz Ou M203 |
| 04.00 | Tlz Spanish Fix |
| 04.30 | Tlz Landmarks: Using The Land |
| 04.50 | Tlz Back To The Floor |
| 05.30 | Tlz Kids English Zone |
| 06.00 | The Animal Magic Show |
| 06.15 | Playdays |
| 06.35 | Insides Out |
| 07.00 | The Really Wild Show |
| 07.30 | Ready Steady Cook |
| 08.15 | Style Challenge |
| 08.40 | Real Rooms |
| 09.05 | Going For A Song |
| 09.30 | Vets To The Rescue |
| 10.00 | Holocaust Memorial Day Service |
| 11.20 | Country Tracks |
| 11.50 | Ready Steady Cook |
| 12.35 | Style Challenge |
| 13.00 | Doctors |
| 13.30 | Eastenders |
| 14.00 | Real Rooms |
| 14.25 | Going For A Song |
| 15.00 | The Animal Magic Show |
| 15.15 | Playdays |
| 15.35 | Insides Out |
| 16.00 | The Really Wild Show |
| 16.30 | Totp Eurochart |
| 17.00 | Home Front |
| 17.30 | Doctors |
| 18.00 | Eastenders |
| 18.30 | Animal Hospital |
| 19.00 | You Rang M'lord? |
| 20.00 | Casualty |
| 21.00 | Absolutely Fabulous |
| 21.30 | Totp Eurochart |
| 22.00 | Maternity |
| 22.50 | Pink Parents |
| 23.40 | Doctor Who: Mawdryn Undead |

## BBC World

| | |
|---|---|
| 00.00 | BBC News |
| 00.30 | HARDtalk (r) |
| 01.00 | BBC News |
| 01.30 | Talking Movies (r) |
| 02.00 | BBC News |
| 02.30 | The Money Programme (r) |
| 03.00 | BBC News |
| 03.30 | Asia Today (r) |
| 03.45 | World Business Report (r) |
| 04.00 | BBC News |
| 04.30 | HARDtalk (r) |
| 05.00 | BBC News |
| 05.30 | Click Online (r) |
| 06.00 | BBC News |
| 06.30 | The Money Programme (r) |
| 07.00 | BBC News |
| 07.30 | HARDtalk |
| 08.00 | BBC News |
| 08.30 | Top Gear (r) |
| 09.00 | BBC News |
| 09.30 | Life (r) |
| 10.00 | BBC News |
| 10.30 | HARDtalk (r) |
| 11.00 | BBC News |
| 11.30 | Talking Movies (r) |
| 12.00 | BBC News |
| 12.30 | Life (r) |
| 13.00 | BBC News |
| 13.30 | HARDtalk (r) |
| 14.00 | BBC News |
| 14.15 | World Business Report |
| 14.30 | Talking Movies (r) |
| 15.00 | BBC News |
| 15.30 | Life (r) |
| 16.00 | BBC News |
| 16.30 | Asia Today |
| 17.00 | BBC News |
| 17.15 | World Business Report |
| 17.30 | Top Gear (r) |
| 18.00 | BBC News |
| 18.30 | World Business Report |
| 18.45 | Sport Today |
| 19.00 | BBC News |
| 19.30 | HARDtalk (r) |
| 20.00 | BBC News |
| 20.30 | Physical World |
| 21.00 | BBC News |
| 21.30 | World Business Report |
| 22.00 | BBC News |
| 22.30 | Correspondent |
| 23.00 | BBC News |
| 23.30 | World Business Report (r) |
| 23.45 | Asia Today |

## 3 Viasat

| | |
|---|---|
| 05:00 | Børne-hjørnet med Disney |
| 07:00 | Garfield og venner |
| 07:30 | TV-shop |
| 09:00 | Sunset Beach |
| 09:50 | Træneren |
| 10:20 | Horton-sagaen (G) |
| 11:10 | Horton-sagaen |
| 12:00 | Melrose Place - classic |
| 12:55 | Vild med dig |
| 13:25 | Panter-tanter |
| 13:55 | Xena - amazonekrigeren |
| 14:45 | Baywatch |
| 15:40 | Min kære familie |
| 16:10 | Ricki Lake |
| 17:10 | Dagens Nyheder på TV3 |
| 17:30 | Baren (G) |
| 18:00 | Alle tiders barnepige |
| 18:30 | Baren |
| 19:00 | GRISK - når det gælder |
| 20:00 | Skjulte Spor |
| 21:00 | Heksene fra Warren Manor |
| 21:55 | Baren (G) |
| 22:25 | Dagens Nyheder på TV3 |
| 22:40 | Vore værste år |
| 23:10 | Simpsons |
| 23:40 | Ti tommelfingre |
| 00:10 | Michael Hayes |
| 01:05 | Kojak |
| 02:05 | I lyst og nød |
| 02:35 | Drøm videre |
| 03:00 | Ricki Lake (G) |
| 04:00 | Godnat |

## Útvarp Føroya

| | |
|---|---|
| 07.00 | Tíðindi (e) |
| 07.05 | Morgunlesturin<br>Jákup Reinert Hansen, prestur, lesur |
| 07.15 | Barnaløtan<br>Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri |
| 07.30 | Tíðindi |
| 07.35 | Morguntónleikur |
| 08.00 | Tíðindi |
| 08.03 | Morgunrásin |
| 09.00 | Tíðindi |
| 09.03 | Morgunrásin |
| 09.50 | Morgunlesturin (e)<br>Jákup Reinert Hansen, prestur, lesur |
| 10.00 | Tíðindi |
| 10.03 | Fyrrapartsløg<br>Øssur Egholm stílar fyri |
| 11.00 | Tíðindi |
| 11.03 | Undir døgurða |
| 12.00 | Veðurtíðindi |
| 12.02 | Middagstónleikur |
| 12.15 | Skráin og lýsingar |
| 12.20 | Tíðindini |
| 12.40 | Døgurðatónar |
| 13.00 | Heimurin í dag (e)<br>Óluva Zachariasen leggur til rættis |
| 13.30 | Tónleikur |
| 14.00 | Fimmarin (e)<br>Sigmar Bláberg stílar fyri |
| 15.00 | Tíðindi |
| 15.03 | Frívaktin<br>Sending við tónleiki og práti um sjómanslív.<br>Elis Poulsen skipar fyri |
| 16.00 | Tíðindi |
| 16.05 | Ársins Songrødd í Vágum |
| 17.00 | Tíðindini |
| 17.05 | Í Víngarðinum |
| 18.05 | Barnaløtan (e)<br>Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri |
| 18.25 | Skráin og lýsingar |
| 18.30 | Tíðindini |
| 19.00 | Tilvera<br>Armgarð Arge leggur til rættis |
| 19.30 | Harmonikutónar<br>Flóvin Jacobsen skipar fyri |
| 20.30 | Á sanganna veingjum<br>Gunnvør Poulsen stílar fyri |
| 21.00 | Tíðindi |
| 21.05 | Dagsetur<br>Ginna Midjord skipar fyri |
| 22.00 | Rák<br>Anita Ottosen stílar fyri |
| 23.00 | Tíðindi |

## Rás 2 FM 102 FM 107

| | |
|---|---|
| 09:45 | Orðið<br>Bíbliulestur v/ Anju Hansen |
| 10:00 | Tónleikur |
| 11:00 | Birgir Beinleiðis<br>Birgir Sondum við gesti |
| 12:00 | Tíðindi & Lýsingar |
| 13:00 | Leysaløtan<br>Innsløg, prát og tónleikur |
| 14:00 | Ynskiløtan<br>Heilsur frá lurtarunum |
| 15:00 | Tíðindi og lýsingar |
| 15:15 | Ynskiløtan (framhald) |
| 16:00 | Laila Beinleiðis<br>Country, Laila Jacobsen leggur til rættis |
| 17:00 | Norðlýsið!<br>Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík.<br>John William og Oliver Joensen leggja til rættis. |
| 18:00 | Tíðindi og lýsingar |
| 18:15 | Lættur tónleikur |
| 19:00 | Orð á leiðini<br>EvR sending "Eyðmjúkleiki Jesusar".<br>Jógvan Zachariassen leggur til rættis |
| 19:40 | Tónleikur |
| 21:00 | Tíðindi og lýsingar |
| 21:15 | Orðið (e)<br>Bíbliulestur v/ Anju Hansen |
| 21:30 | Girlzone<br>Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri.<br>Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo |

## Lindin

| | |
|---|---|
| 13.00 | Byrjan - Dagsskrá |
| 13.15 | Okkara dagliga breyð |
| 13.30 | Sjómanssendingin<br>Vitin, vertur er M. C. Restorff (e) |
| 14.30 | Tónleikur fyri børn |
| 15.00 | Tónleikur |
| 17.00 | Ungdómssendingin<br>Get Ready v/ Rigmor og Rebekku |
| 18.00 | Dagsins Orð |
| 18.05 | The Finishing Touch - Ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo |
| 19.00 | Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending |
| 19.05 | »The Finishing Touch« heldur fram |
| 20.00 | Tónleikur fyri børn |
| 20.30 | Okkara dagliga breyð |
| 20.40 | Møti kunngeðir fyri komandi vikuskifti |
| 21.00 | Bønarlinjan við gesti - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379. Vertur: Jenis av Rana |

Vit gevast uml. middnátt

## Menninir, sum hildu seg vera gudar

*– fronsk dokumentarsending*

**SVF Hóskvøldið kl. 21.50**

Shiko Asahara er guru fyri sektina Hin Hægsti Sannleikin. Í 1995 gevur hann sínum viðhaldsfólki boð um at gera eitt eitursálop við eitri á undirgrundartokstøðina í Tokyo.
Jo Di Mambro er guru í Sóltempulordaninum. Í 1994 sigur hann við síni viðhaldsfólk, at tey skulu fara eina ferð til gongustjørnuna Sirius.
David Koresh er leiðari hjá Davidinarunum. Í 1993 setur hann síni viðhaldsfólk inn í stríðið móti FBI, sum hevur umgyrt húsið, har sektin heldur til í Waco.

## Skjulte Spor

*– Donsk dramarøð*




Eftir at ein stórur eldur hevur verið í einum íbúðarblokki, eru tríggir persónar deyðir. Eini eldri útlendsk hjún, og ein av sløkkiliðsmonnunum, sum varð sendur inn at bjarga hesum hjúni. Alt bendir á, at eldurin varð ásettur, men hvat var endamálið? At drepa hjúnini? Tann illa dámdi "junkie" í íbúðini við síðuna av. Ella kanska at beina fyri einum triðja persóni? Við Charlottu og Spidsel á odda fara vinir okkara inn í heimin hjá sløkkiliðnum at loysa gátuna. Tað er ein heimur, har kvinnur ikki eru vælkomnar, har strangleikin er miskunnarleysur, og har minsta mistakið kann kosta lívið.

## Heksene fra Warren Manor (33)

*– Amerikansk dramasending*




Tær tríggar systrarnar fáa til uppgávu at ansa eftir einum lítlum barni, fyri at verja tað móti einum sera óndum spøkilsi. Tær finna útav, at spøkilsi miðvíst hevur dripið allar menninar í familjuni hjá barninum. Síðani fara tær at finna útav, hví spøkilsi drepur, og royna alt tað, tær kunnu, at verja barnið.

gult29 cyan29 magenta29 svart29

# ítróttur

Nr. 72 • hósdagur • 12. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# –Tjaldur visti av hesum

**Í Vágunum eru tey ikki í iva um, at Tjaldur visti boð um hóttanina fyri niðurflyting undan útidystinum móti Sóljuni, sum vann dystin, og har við togaði seg av niðasta sessnum**

HONDBÓLTSTRÆTA
*Jákup Mørk*

Í týsdagsblaðið okkara umrøddu vit ónøgdina hjá Tjaldrinum um, at tað í fyrsta umfari er líkt til, at tær missa sessin í bestu kvinnudeildini. Hetta tí tær ikki møttu til útidyst í Vági í grundspælinum. Boðini frá Tjaldrinum vóru, at tey so avgjørt ikki ætla sær at góðtaka hesa avgerð uttan víðari, tí tey vistu einki um, at hetta kundi gerast avleiðingin av, at tær ikki møttu til dystin í Vági.

### Greiddu sín setning

Hvat úrslit komið verður til í hesum málinum, er so ikki greitt enn, men vit nevndu í blaðnum ígjár, at tað neyvan fór at ganga stillisliga fyri seg, um tað nú ístaðin verður Sóljan, sum skal flyta niður. Hetta um Tjaldur fekk viðhald í málinum, og tískil kundi lyfta seg upp um vágagenturnar á stigatalvuni.

Boðini úr Vágoynni eru sjálvandi eisini, at tey so avgjørt ikki ætla sær úr deildini, tí tey eru ikki í iva um, at tey í teimum 24 landskappingardystunum hava tryggjað sær framhaldandi luttøku í bestu deildini.

– Setningurin hjá okkum hevur alla tíðina verið at halda fast um sessin í bestu deildini. Undan kappingini vistu vit av, at í hesum varð allar helst neyðugt at halda Tjaldri aftan fyri okkum, og hesum máli hava vit rokkið.

Hetta sigur Albert Ellefsen, sum í vetur hevur verið hjálparvenjari hjá Sóljuni. Víðari sigur hann, at hann av fyrstan tíð var í øðini, tá Tjaldur ikki møtti til dystin í Vági.

– Eg hugsaði tá beinan vegin, at hetta var funnin fressur fyri Tjaldri. Tær høvdu tapt við 28 málum í fyrra heimadystinum móti VB, og við at sleppa undan útidystinum, avmarkaðu tær negativa málmunin.

– Seinni varð eg tó sissaður, tá eg fekk at vita, at hondbóltsreglurnar vóru púra greiðar á hesum øki, soleiðis at um vit endaðu ájavnar Tjaldri í stigum, hevði málmunurin einki at siga. Vit høvdu verið frammanfyri orsakað av væntandi uppmøtingini hjá Tjaldri.

### Vistu boð

Víðari sigur Albert, at hann er ikki í iva um, at Tjaldur eisini vistu boð um hetta, tá tær fríggjadagin leiktu avgerandi dystin móti Sóljuni.

– Eg eri fullkomuliga sannførdur um, at tær vistu, hvat stóð upp á spæl í hesum dystinum, og tað var eisini sjónligt á teimum reaktiónum, sum vóru eftir dystin. Meðan vit fegnaðust um, at mál okkara var rokkið, sást týðiliga á mótstøðuliðnum, at tær vistu, at tær komandi árið skuldu spæla í áðru deild.

– At tey nú royna at geva HSF skuldina fyri hetta, kunnu vit ikki taka okkum av. Teirra mistak var, at tær ikki vunnu dystin á Giljanesi. Har høvdu bæði liðini somu treytir, so HSF skal ikki hava skuldina fyri hetta, sigur Albert.

Hann leggur eisini afturat, at ítróttarliga er heldur ikki so nógv, sum bendir á, at tað skal verða Sóljan, sum flytir niður í næstbestu deildini.

– Tú skalt minnast til, at Sóljan hevur vunnið sjey stig í ár, meðan Tjaldur hevur vunnið seks. Vit hava mist eitt stig, tá stigini vórðu hálverað í vetrarsteðginum, og tí eru vit nú ájøvn í stigatali. Heldur ikki vóru vit vánaligasta liðið í endaspælinum, tí har hava vit fingið fýra stig, meðan Kyndil hevur fingið trý.

### Skelkaður av HSF

Tað, sum tó serliga fær Albert til at gera viðmerkingar um málið, er, at HSF tykist hava latið tað upp í hendurnar á VB og Tjaldrinum at gera av, um dysturin frá 10. desember skal leikast, nú kappingarárið er lokið.

Hann sigur seg vera skelkaðan av hesum, og vísir á fleiri lutir, sum hava við sær, at ein slík avgerð vildi verið púra burtur við og órættvís móti Sóljuni.

– Síðani vit fingu boðini um, at málmunurin einki hevði at siga, hava vit so heldur ikki hugsað um hetta. T.d. kunnu vit nevna dystin í Klaksvík, sum vit taptu 41-3. Eingin av leikarunum legði nakað í hetta tapið, og hevði tað verið endamálið, kundi tapið allar helst avmarkast, soleiðis at munurin ikki hevði verið somikið stórur. Hartil skal eisini hugsast um, at støðan hjá Tjaldrinum í dag og hin 10. desember als ikki kann samanberast, eins og VB tá var sera væl fyri.

– At Tjaldur so síðani hevur offrað 300.000 kr. upp á leikarar, og at tey hava gjørt sáttmálar fyri komandi ár, er so ikki nakað, sum vit skulu revsast fyri. Tær verða hinvegin revsaðar fyri væntandi seriøsitet í fyrru kappingarhálvu.

Albert leggur at enda afturat, at hann einki hevur ímóti Tjaldrinum sum so, men hann noktar at góðtaka, Sóljan skal gerast til svarti Per í hesum, ella at tað verður VB ella HSF, sum brádliga skulu gerast til syndabukkar í stríðnum um niðurflyting.



*Vesturi í Vágunum eru tey ikki í iva um, at Tjaldur kendi avleiðingarnar, um tær taptu fyri Sóljuni í seinasta dystinum*

## Dysturin, VB-Tjaldur, 1. deild kvinnur 10. desember 2000



*Bogi Mortensen*
*Vágs Bóltfelag*

Fyri at fáa ymiskar misskiljingar av vegnum, hava vit hesar viðmerkingar til omanfyri nevnda dyst.

Tann 10. desember 2000 umleið kl. 09.10 ringdi umboð fyri Tjaldur til umboð fyri hondbóltin hjá VB og segði frá, at 1. deild kvinnur ikki komu til Vágs at spæla hendan dystin, tí veðrið var ov rngt. Tá tey ringdu, vóru tey stødd á Skipanesi.

Samstundis vóru gentur 10 hjá m.ø. Tjaldri á veg norður við Smyrli eftir at hava spæla hondbólt í Vági leygardagin, 9. desember 2000.

Tá VB seinni spurdi kappingarnevndina, hvussu bleiv við hesum dysti, varð sagt, at VB vann dystin við málmuninum 0-0. Hetta varð eisini staðfest í yvirlitinum yvir støðuna í 1. deild hjá kvinnum.

Hetta kundu vit ikki góðtaka. Tí hetta kom at ávirka málmunin hjá VB umframt toppskoraralistan. Hesin er sostatt ikki fullfíggjaður fyri kappingarárið 2000/01.

Harumframt framførdu vit sambært grein 8.6, at VB átti rætt til endurgjald fyri at missa henda heimadyst, og sambært grein 6.9 at Tjaldur skuldi missa rætt til heimadyst í returdystinum. Við tað at fyrri dysturin longu var spældur í grundspælinum í Runavík, kravdu vit at fáa báðar dystirnar í endaspælinum spældar í Vági. Um hetta ikki var gjørligt, kravdu vit rætt til heimadyst í steypakappingini, hóast vit høvdu trekt Tjaldri á útivølli.

Vit fingu at vita frá kappingarnevnd og dómsnevnd, at vit ikki fingu viðhald í hesum. Grundspæl, endaspæl og steypakapping eru hvør sínar kappingar, er niðurstøðan hjá HSF. Hetta hóast bæði stig, mál, málskorarar, reyð kort v.m. verða flutt frá grundspæli til endaspæl. VB avgreiddi sostatt bæði sín dyst í steypakapping og sín dyst í endaspælinum í Runavík.

Eftir seinasta leikumfar – fýra mánaðir eftir omanfyri nevnda dyst – er hesin aftur vorðin áhugaverdur. Hetta tí hesin er avgerandi fyri, hvør ið flytur niður í aðru deild.

Og nú er tað VB, ið skal avgera, hvør í flytur niður.

VB hevur onga støðu til, hvør í skal flyta niður. Men tað skal gerast heilt greitt, at VB ikki kann góðtaka at spæla ein dyst, ið HSF hevur tikið avgerð um og samstundis gera Sóljuna til tapara. Hetta skilja øll – eisini Tjaldur.